KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

Klaksvíkar Býráð - eykafundur

Dagfesting: 01.05.2014 kl. 19:00
Málnr.: 13/00245

Nevndarlimir: Jógvan Skorheim, Steinbjørn O. Jacobsen, Gunvá við Keldu, Óluva Klettskarð, Jóhann Lützen, Kristian Eli Zachariasen, Signhild V. Johannesen, Eyðstein Ó. Poulsen, Elsebeth Mercedis Gunnleygdóttur, Atli S. Justinussen og Herfrí J. Sørensen.

Onnur: Tummas T. Eliasen, kommunustjóri
Protokollførari: Jensa Anthoniussen, stjórnarskrivari

Málsyvirlit		
Til viðgerðar		
54/14	14/00426-2	Javnbjóðis samstarvsavtala millum kommunurnar í Norðoyggjum um heimatænastu, eldrarøkt v.m.

54/14
14/00426 Javnbjóðis samstarvsavtala millum kommunurnar í Norðoyggjum um heimatænastu, eldrarøkt v.m.

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Klaksvíkar Býráð	01.05.2014	54/14	

Frágreiðing um málið:
Uppskot er gjørt til javnbjóðis samstarvsavtalu millum kommunurnar í Norðoyggjum um Norðoya Bú- og Heimatænastu (sí viðhefta skjal).
Endamálið við hesum samstarvi er at líkastilla allar kommunurnar í Norðoyggjum og allar teirra borgarar í mun til tænasturnar innan eldraøkið. Talan er um javnbjóðis millumkommunalt samstarv við sjálvstøðugum rakstri og fíggjarstøðu á sama hátt sum aðrir millumkommunalir felagsskapir.

Lógargrundarlag:
Løgtingslóg nr. 19 frá 7. apríl 2014 um heimatænastu, eldrarøkt v.m.

og

Løgtingslóg nr. 20 frá 7. apríl 2014 um kommunalt samstarv um heimatænastu, eldrarøkt v.m., sum inniheldur eitt nú hesar ásetingar:

- § 4, stk. 1: "*Kommunurnar skulu áðrenn 1. mai 2014 hava skipað seg í kommunal samstarvsøki, ið hava til endamáls at umsita heimatænastu, eldrarøkt v.m. í avvarðandi kommunum*".
- § 4, stk. 2: "*Kommunalu samstørvini skulu í mestan mun skipast samsvarandi hesum økjum: 4) Norðoyggjar*.

- § 6, stk. 1: "*Kommunal samstørv, sbrt. § 4, skulu áðrenn 1. mai 2014 hava gjørt skrivliga avtalu sínámillum um skipan av samstarvinum*. Stk. 2: *Kommunur í einum samstarvsøki skulu velja at skipa samstarvið sum: 1) Javnbjóðis samstarv, ella 2) vertskommunusamstarv*".
- § 7, stk. 9: "*Í samstarvsavtaluni skal semja í minsta lagi vera um:*
  1) Heitið á samstarvinum, har orðið "tænasta" skal innganga.
  2) Hvussu dagliga umsitingin verður skipað, og hvar hendan er staðsett.
  3) Hvussu visitatión/upptøka verður skipað.
  4) Hvussu ognarviðurskiftini verða skipað.
  5) Hvussu íløgur verða skipaðar.
  6) Á hvønn hátt leiðslubygnaðurin verður skipaður.
  7) Á hvønn hátt eftirlit verður skipað.
  8) Hvør hevur avgerðarrættin á økinum heimatænasta, eldrarøkt v.m. og tekur avgerðir vegna kommunurnar í samstarvsøkinum. Bert ein avgerðarmyndugleiki kann vera í hvørjum samstarvi.
  9) Hvør er setanarmyndugleiki á økinum heimatænasta, eldrarøkt v.m. Bert ein setanarmyndugleiki kann vera í hvørjum samstarvi.

Fíggjarligar avleiðingar:
Verða nærri lýstar seinni eftir samráðingarnar millum land og kommunur um fíggingarleist í sambandi við yvirtøku av eldraøkinum.

Tilmæli:
Klaksvíkar Býráð verður
1. at taka støðu til javnbjóðis samstarvsavtaluna, og
2. at velja 6 limir - borgarstjórin íroknaður - og 2 varalimir í stýrið fyri Norðoya Bú- og Heimatænastu. Hesir skulu veljast millum kommunustýrislimirnar (sí § 7, stk. 1 um stýri í samstarvavtaluni).

Samtyktir
BýR 01-05-2014:
Einmælt samtykt
1. at taka undir við *Javnbjóðis samstarvsavtalu millum kommunurnar í Norðoyggjum um heimatænastu, eldrarøkt v.m.*, dagfest 30. apríl 2014, tó við tí treyt, at samstarvsavtalan verður endurskoðað í seinasta lagi um tvey ár, og
2. at velja hesar limir - Jógvan Skorheim, Óluva Klettskarð, Signhild V. Johannesen, Eyðstein Ó. Poulsen, Gunvá við Keldu og Herfrí J. Sørensen - og hesar varalimir - Steinbjørn O. Jacobsen og Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur - í stýrið fyri Norðoya Bú- og Heimatænastu.

Fundurin lokin kl. 20:15

Jógvan Skorheim

Steinbjørn O. Jacobsen

Gunvá við Keldu

Óluva Klettskarð

Jóhann Lützen

Kristian Eli Zachariasen

Signhild V. Johannesen

Eyðstein Ó. Poulsen

Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur

Atli S. Justinussen

Herfrí J. Sørensen